# Smidligari skipanir og skjót hjálp eru høvuðsmálini

**At gera skipanirnar smidligari og geva skjóta hjálp eru høvuðsmálini frameftir. Og kravið er, at almenn tilboð verða samskipað, so borgarin og ikki tilboðið verður í miðdeplinum, segði Bill Justinussen á Trapputinginum mánakvøldið**

TINGHELLAN
*Bill Justinussen*

»Elskaði mín! Eg vil, at tú í øllum lutum hevur tað gott, og at tú hevur heilsuna, eins og tað veit sál tíni væl við.«

Hesa heilsan lesa vit í fyrsta versi í 2. Jóhannusarbrævi í Bíbliuni. Heilsanin hóskar væl sum meginregla hjá øllum, sum ynskja næstanum væl, og serliga væl hóskar hon sum yvirskrift yvir almennu umsorganina, sum eitt framkomið land hevur fyri sínum borgarum. Her síggja vit, hvussu tey kristnu hugsaðu í byrjanini, og hendan kristna hugsanin - umsorganin fyri hinum - hevur spjatt seg um allan heim síðani tá. Samfeløg hava bygt sínar lógir á megintankarnar um, at borgarin skal hava tað gott í øllum lutum, at hann skal hava heilsuna og trívast sálarliga. Tí hava vit bæði almanna- og heilsuverk.



*– Við Sinnisbata á odda í stríðnum fyri korum teirra sálarsjúku eru framstig gjørd seinnu árini, hóast tað enn er langt á mál. Ein trupulleiki er, at landsstýrismenn í ov stóran mun halda, at allir spurningar verða loystir við at gera álit, frágreiðingar, útgreiningar, tilmæli og upprit, men so er ikki, segði Bill Justinussen*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Forsorgarlógin, sum er høvuðsevnið í Miðlahúsinum hesa vikuna, sigur, hvørja skyldu tað almenna hevur mótvegis landsins borgarum og samstundis, hvørja skyldu borgararnir hava mótvegis hvørjumøðrum og tí almenna. Í §1 stendur: "Det offentlige er forpligtet til at komme enhver til hjælp, som ikke er i stand til at skaffe sig og sine det fornødne til livets ophold". Hesin er høvuðstátturin, og eftir hesi meginreglu verða nakrar hundrað milliónir árliga latnar teimum, sum vegna heilsubrek, sálarligt brek, menningartarn, arbeiðsloysi ella annað ikki megna at uppihalda sær og sínum.

Hóast forsorgarøkið og serforsorgarøkið eru sera umfatandi, megnaði frálíki fundarstjórin Jóannis Hansen at halda fast í einstøkum evnum, sum høvdu støði í røðunum hjá Jóannisi Dalsgarð og Svenningi av Lofti. Tí vórðu mest orð skift um støðuna hjá teimum sálarsjúku og teirra bústaðarviðurskifti. Við Sinnisbata á odda í stríðnum fyri korum teirra sálarsjúku eru framstig gjørd seinnu árini, hóast tað enn er langt eftir á mál. Ein trupulleiki er, at landsstýrismenn í ov stóran mun halda, at allir spurningar verða loystir við at gera álit, frágreiðingar, útgreiningar, tilmæli og upprit, men so er ikki. Á sálarsjúkuøkinum er alt sagt og skrivað, sum er neyðugt fyri at seta átrokandi politisku tiltøkini í verk, og tí eigur landsstýrismaðurin, eins og Svenning so greitt vísti á, at arbeiða eftir tí skrivliga tilfari, sum fyriliggur. Her verður serliga hugsað um "Álitið um Heildarpsykiatri", sum fakfólk og avvarðandi í góðum samstarvi hava gjørt. Eitt dygdarverk. Álitið hevði neyvan verið brúkiligt, um bert fakfólk ella bert foreldur høvdu gjørt tað, men júst felags niðurstøðurnar tryggja, at tilboðið verður tað rætta.

Tíverri hoyrdu vit mánakvøldið um eitt annað álit um alment tilboð, sum ikki er gjørt eftir sama leisti. Álitið um stovn til atferðartrupul børn. Her hava tey avvarðandi ikki verið við í arbeiðnum, og tí síggja vit beinanvegin, at MPD/Damp felagið ikki vil vita av tilboðnum. Hví hevur landsstýris-

---

Jørgen Niclasen:

# Játtanin fylgja brúkarunum

*- Virðingin fyri hvørjum einstøkum eigur at setast í hásæti. Samgongan er nú samd um ein bústaðarpakka. Hesin er størsta frambrot innan økið nakrantíð. Pakkin leggur upp til, at øll skulu hava sama møguleika at ogna sær bústað uttan mun til hvat slag, segði Jørgen Niclasen*
*Mynd: Álvur Haraldsen*



Evnið á trapputinginum mánakvøldið var forsorg og serforsorg. Tað fyrsta, ið rann mær til hugs var, at tað er brúk fyri okkum øllum. Summi eru góð til okkurt, onnur til annað; summi kunna nóg, meðan onnur kunna minni. Men øll kunna okkurt, men tað hyggja vit alt ov lítið eftur.

Vit skulu ikki spyrja, "hvat kannst tú ikki", vit skulu spyrja "hvat kannst tú". Vit eiga at hyggja meir eftir møguleikin, heldur enn bara at hyggja eftir trupuleikum.

Tað er brúk fyri øllum, eingin ivi er um. Jú fleiri ið lyfta, jú meira lyfta vit.

## Kundar, ikki plágur

Í spurnarkanning um nøgdsemi hjá teimum ið bera brek, var spurningurin um pensión einasta punktið við líkinda nøgdsemi. Kann ikki kallast at skipanin leitar eftir møguleikum. Ella sum forðamaðurin í MBF hevur sagt, "samfelagið elskar at skapa fyritíðarpensionistar, vit ynskja møguleikar"

Almenna skipanin treingir broytingar.Vit hoyra alt ov ofta orðaval sum, at renna frá Per til Pól, at detta niður millum stólar, fyri ikki at tosa um fólk mótvegis almenna stysteminum eru plágur heldur enn kundar.

Fólk noyðast at brúka alt ov nógvar kreftir til at renna frá hurð til hurð fyri at finna møguleikar fyri sær og sínum. Fyri brúkaran ótolandi og súgvandi fyri allar kreftir. Fyri almennu skipanina alt ov stór arbeiðsbyrða.

## Vit hava brúk fyri øllum

Eitt av hugskotunm sum kom fram á fundinum, er eitt sera gott alternativ til verandi skipan. Lat játtanina fylgja brúkarnum. Brúkarin skal á eina hurð og kann so sjálvur/sjálvi velja millum tilboð sum eru at finna. Privatið marknaðurin vil beinanvegin skapa tilboðini og møguleikarnar. Kreftirnar hjá fólkið vilja tá fara til møguleikar. Eitt frálíkt hugskot.

Hví skulu fólk kallast ein útreiðsla hjá samfelagnum. Svarið er einfalt, tí almenna skipanin hevur ikki havt hugflog at hugsa ørvísi. Vit hava vilja loyst trupuleikar heldur enn at skapa møguleikar. Gongd er nú komi á hetta seinna. Skipanin við vardum størvum hevur seinastu árini ment seg munandi, og alt fleiri koma út á arbeiðsmarknaðin. Somuleiðis er endurbúgving ment. Vit hava fatur á rætta endanum.

Spurningurin kann ongantíð verða, hvussu nógvan pening vit nýta, men hvat vit fáa fyri peningin.

## Bústaðarframbrotið

Virðingin fyri hvørjum einstøkum eigur at setast í hásæti. Samgongan er nú samd um ein bústaðarpakka. Hesin er størsta frambrot innan økið nakrantíð. Pakkin leggur upp til at øll skulu hava sama møguleika at ognað sær bústað uttan mun til hvat slag.

Tað verður upp til hvønn einstakan, hvussu stóran part av